Avtalan undirskrivað í Føroyum

So var friður. Markið millum Føroyar og Bretland er komið uppá pláss, og løgmaður Anfinn Kallsberg, danski uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen og bretski varauttanríkisráðharrin Anthony Lloyd kunnu fara hvør til sítt uttan at hugsa um hetta 22 ára gamla stríð

Mynd: Kalmar

Tá ið marknaavtalan millum Bretland og Føroyar bleiv undirskrivað í Tinganesi tyskvøldið, segði Anfinn Kallsberg, at hann var glaður fyri, at avtalan bleiv undirskrivað í Føroyum og ikki aðrastaðni. Løgmaður vísti á, at avtalan uttan iva hevur størsta politiskan týðning her á landi

LEIF LAADAL

Tað er ikki heilt óvanligt, at tryggdarkrov verða sett í sambandi við almennar vitjanir úr útlondum, men nú bretski varauttanríkisráðharrin var í Føroyum í sambandi við, at marknasáttmálin skuldi undirskrivast, voru serliga hørð tryggdarkrov. Uttan at sammeta var orsøkin til hesi krov stríðið á Balkan. Bretland er saman við USA og Fraklandi tað landið, sum við harðari hond reynir at fáa frið í fyrrverandi Jugoslavia, og bretski luturin í krignum á Balkan hevði við sær, at eitt stórt partur av løgreglani var á varðholdi hendan friðardag í Havn.

Stríðið um markið er av Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen og bretski varauttanríkisráðharrin, Anthony Lloyd, settu sínar undirskriftir á sáttmálan, og so var hann í prinsippinum galdandi. Fyri ikki at forsmaa føroyingar slapp løgmaður Anfinn Kallsberg eisini at seta sína undirskrift á sáttmálan, men hetta var meiri ein myndalig hending. Sáttmálin krevur, eftir verandi lóg, undirskriftir frá danskari og bretskari síðu fyri at vera galdandi.

Halda seg til lógina

Anfinn Kalsberg vísti to á, at hetta var fyrstu ferð, at føroyingar hava undirskrivað eina tilika avtalu. Higartil hava danskir myndugleikar undirskrivað slíkar avtalur vegna føroyingar, so løgmaður var glaður um, at mannagongdin í tilíkum málum er við at broytast.

Niels Helveg Petersen segði um mannagongdina, at hann var noyddur at halda seg til galdandi lógir á økinum.

Sum nu er, so mugu danskir myndugleikar verða við, tá ið uttanríkispolitiskar avgerðir skulu takast, men hvussu tað verður í framtíðini, er upp til føroyingar at finna útav. Hvussu stoðan verður í framtíðini, er upp til føroyingar sjálvar, segði løgmaður.

– Eg vit velja at taka yvir uttanríkismál, so verða tað føroyingar, sum sjálvir fara at samráðast um líknandi mál í framtíðini, segði Anfinn Kallsberg.

Løgmaður Anfinn Kallsberg mintu eisini á, at tað fyri ein rættliga stóran part høvdu verið føroyingar, sum tóku sær av sjálvum samráðingunum. Hetta var gjørt við loyvi frá danska uttanríkismálaráðnum.

Tað var ein stór løta, tá ið semjan við bretar endiligva bleiv staðfest. Nærum øll landsins leiðsla var boðin út í Tinganes hetta goðveðurskvøld í mai. Har voru ikki færri enn fimm fyrrverandi løgmenn, landsstýrismenn, aðalstjórar, umboð fyri løgmannsskrivstovuna, fólkatingslimir, formannskapurin á tingi og øll uttanlandsnevndin.

Utlendsku umboðini vóru umframt tær báðar Lloyd og Helveg Petersen, atta bretskir ráðgevar og eini 20 danskir.

Árni í essinum

Serliga ein maður fekk nógv rósandi orð við á vegnum, og hesin sami stóð eisini undir líðini á løgmanni, tá ið sáttmálin bleiv undirskrivaður. Arni Olafsson hevur verið formaður í samráðingarnevndini hetta seinasta árið, men hevur arbeitt við málinum í nógv ár. Danski uttanríkisráðharrin nevdi Arna Olafsson, sum tann einasta við navni, tá ið hann takkaði fyri stríðið, og bæði løgmaður og Anthony Lloyd hugdu við virðing eftir manninum, sum eigur sín stóra lut í hesi semju, tá ið teir takkaðu.

Alt var sera væl fyriskipað uti í nyumvaldu hølunum í Tinganesi hetta kvøldið. Løgmannsritarin John Rajani hevði staðið fyri samskipanini, og hesi uppgávu slapp hann sera væl fra. Alt gekk uppá stás, og karmurin um hesa hátíðarløtu kundi ikki verið betri.

Hví kom markatrætan

Í 1963, eftir at Danmarkar ríki var vorðið bundið av Genf-sáttmálanum frá 1958 um landgrunn, varð yvirvaldsrættur Ríkisins landgrunninum viðvíkjandi lýstur fyri Føroyar við kongligari fyriskipan. Tá varð eingin roynd gjørd at avmarka landgrunnin, ið sambært 1958-sáttmálanum rakk út á 200 metra dýpdarkurvuna, ella so langt til bar at troyta tilfeingið í honum.

Undir 3. havrættarstevnu ST, sum byrjaði 1974, gjørdist skjótt greitt, at altjóða samfelagið góðtók, at strandalond kundu kanna sær tilfeingisøki, annaðhvørt sum fiskiøki ella sum búskaparligt øki, ið eisini fevndi um landgrunsrættindi, út á 200 fjórðingar úr landi. Brátt varð viðurkent sum landasiðvenja at seta 200 fjórðinga mark.

Í løgtingsmáli nr. 2/1976 samtykti Føroya Løgting, at fiskimarkið kring Føroyar skuldi verða flutt úr 12 og út á 200 fjórðingar. Hetta varð síðan framt við kgl. fyriskipan at galda frá 1. januar 1977. Við heimild í lóg nr. 597 frá 17. desember 1976 um fiskimark danska ríkisins og í samsvari við altjóðarætt varð gjørt av, at har mátti enn 400 fjórðingar vóru til næsta land, og um ikki annað varð avtalað við grannalondini, skuldi markið móti teimum vera miðlinjan. Sostatt gjørdist tørvur á at seta mark móti grannalondunum Noregi, Íslandi og Bretlandi.

Í boðskrivi frá 13. desember 1976 skjeyt Bretland upp, at fiskimørkini millum bretska og danska ríkið skuldu fylgja miðlinjuni, bæði í Norðsjónum og í Norðuratlantshavi. Danmark tók undir við hesum við boðskrivi frá 23. desember 1976. Tá ið partarnir seinni kunngjørdu sínt fiskimørk, kom undan kavi, at ikki var semja um, hvussu miðlinjan millum Føroya og Bretlands skuldi roknast. Danskir myndugleikar høvdu roknað miðlinjuna frá teimum beinu føroysku grundlinjunum og frá oyggjabólkinum St. Kilda, men høvdu ikki roknað frá tí fjarskotna oyðiklettinum Rockall ella frá ávísum skotskum hólmum ella smáoyggjum, nevnliga Sule Skerry (Súluskerið Eystara), North Rona, Sula Sgeir (Súluskerið Vestara) og oyggjabólkinum Flannan Isles. Bretskir myndugleikar roknaðu fiskimarkið út frá øllum hesum skotsku hólmum og klettum, men ikki frá teimum beinu grundlinjunum undir Føroyum.

Orsakað av hesum ymsu roknihættum gjørdust trý øki við umskarandi krøvum um fiskløgdømi, sonevnd «grá øki»:

1) Millum Føroya og Hetlands, orsakað av ósemjuni um ta beinu føroysku grundlinjuna eystanfyri (um 200 ferkilometrar).

2) Millum Føroya og Skotlands orsakað av ósemjuni um hólmarnar (um 8.000 ferkilometrar)

3) Í útsuðri, orsakað av ósemjuni um Rockall (um 5.000 ferkilometrar).

Sostatt vóru um 13.000 ferkilometrar umstridd ir. Báðir partar loyvdu sínum skipum at veiða í hesum umstridda økjum, men syndu varsemi við eftirliti við skipum, sum fiskaðu har við loyvi frá mótpartinum. Tey 22 arini, henda ósemja hevur staðið við, hava sera sjáldan verið nakrir tilburðir á hesum umstridda fiskileiðum.

Í 1997, tá ið Bretland góðtók ST havrættarsáttmálan frá 1982, sum heimilar 200 fjórðinga búskaparnarki, men ikki roknað úr oyðiklettum, gávust bretar við at krevja 200 fjórðinga fiskimark roknað úr Rockall, og við hesum datt meginparturin av «grá økinum» í útsuðri burtur. Eftir av tí vóru bert um 80 ferkilometrar, ið stóðust av ósemjuni um tær beinu grundlinjurnar vestan fyri Føroyar.

Tann nýggi havrættur, ið spratt úr 3. havrættarstevnuni, heimilaði strandalondum at krevja landgrunsmark út á 200 fjórðingar, og uppaftur longur út, um náttúrliga framhaldið av landinum óbrotið rakk út um 200 fjórðingar. Við hesum gjørdist greitt, at tørvur fór at verða á avmarking av føroyska landgrunninum mótvegis grannalondum, ið lógu nærri enn 400 fjórðingar, nevnliga Noregi, Íslandi og Bretlandi. Somuleiðis var mangt, sum bendi a, at Føroyar eisini kundu kanna sær landgrunn uttan fyri 200 fjórðingar í útsuðri, við tað, at sunnari parturin av «Føroya-Rockall Háslættanum», tað er økið kring Rockall og Hattonbankan, kundi roknast sum náttúrligt framhald av Føroyum.

Bæði Ísland og Noreg ásettu fyribils miðlinjumark móti Føroyum, tá ið tey settu 200 fjórðingamark, ávikavist í 1975 og 1977. Við Noreg varð avtala gjørd 15. juni 1979 um, at fiskimarkið og landgrunsmarkið skuldu fylgja miðlinjuni.

Hetta er einasti formligi sáttmáli, sum hígartil er gjørdur um mark millum Føroyar og eitt grannaland.

Tá ið føroyska fiskimarkið varð ásett í 1977 kom undan kavi, at ósemja var við Ísland um, hvussu miðlinjan skuldi roknast. Hetta stóðst av, at Ísland hevur roknað sína miðlinju úr oyðiklettinum Hvalsbaki, sum Danmark/Føroyar ikki hava viðurkent sum grundlinjupunkt. Enn er eingin semja fingin í lag við Ísland um hetta.

Longu í 1974 hevði Bretland kannað sær landgrunn vestan fyri Hetland og Skotland. Hetta varð gjørt við sonevndum «designeringum», tað er kunngerðum um, at bretskir myndugleikar, inntil annað varð avrátt, roknaðu ávís øki fyri at vera undir bretskari løggávu landgrunni viðvíkjandi. Tey designeraðu økini vórðu avmarkað við linjum, ið liktust «trappustigum», og sum virdu eina hugsaða miðlinju móti Føroyum innan fyri 200 fjórðingar. Longur suðuri, vestur úr Suðuroyggjum, rukku bretsku designeraðu landgrunsøkini vestur um 200 fjórðingar úr landi. Danska stjórnin tók fyrivarni mótvegis Bretlandi hesum viðvíkjandi. Tá ið Írland eisini kannaði sær landgrunn at um 200 fjórðingar á hesum leiðum, varð somuleiðis fyrivarni tikið mótvegis írsku stjórnini.

Í 1978 var á fyrsta sinni fundur við Bretland um landgrunsmarkið millum Føroya og Bretlands. Hesin fundur avdúkaði ósemju um markið, bæði innan fyri og uttan fyri 200 fjórðingar.

(Keldu: Lagnansskrivstovan/ Uttanlandsdeildin)

Fiskimenn fáa frið

Bretski varauttanríkisráðharrin Anthony Lloyd legði doyin á, at føroyskir fiskimenn ikki fóru at verða riknir burtur úr gráu leiðini millum Skotland og Føroyar frá degi til dags. Hann sissaði áhoyrarafjøldini uti í Tinganesi tyskvøldið og mintu á, at bretar ikki leypa frá altjóða avtalum

LEIF LAADAL

Í marknasáttmálanum millum Føroyar og Bretland stendur í grein seks, at fiskiskip hjá báðum londum hava loyvi at fiska á gráu leiðini. Bretar hava to tryggað sær rættin til undirgrundina, men skuldi tað hent, at teir fara at bora eftir olju ella gassi har, so skulu teir í goðari tíð siga føroyingum frá hesum ætlanum. Hetta fyri at føroyingar skulu fáa tíð at umleggja fiskiskapin, um tað gerst neyðugt.

Kunnu føroyingar so kenna seg tryggar við hesa avtalu? Fara bretar at vera skynsamir og boða frá í goðari tíð?

Anthony Lloyd segði, at hann ikki metti stoðuna í gráa økinum verða so komplisereða, og hann ivaðist ikki í, at bæði oljuvinna – um hon kemur á just hesum økinum – og fiskivinnan kunnu finna útav at samstarva lið um lið. Hann legði afturat, at bretska stjórnin er sera varug við teir trupulleikar, sum kunnu standast av eini so umstridda vinnu sum oljuvinnuni. Tí er tað umráðandi, at oljufelagni halda seg til tær reglur, sum krevjast; bæði innan fyri sjálva avtaluna og viðvíkjandi umhvørvinum.

– Hetta er tað, sum altjóða samfelagið roknar við, og tað vilja vit eisini halda. Avtalan er greið í grein seks, og hana fara vit at halda okkum til, segði Anthony Lloyd.

Annars helt Anthony Lloyd, at avtalan millum Føroyar og Bretland var ein góð avtala. Hann mintu á, at Bretland sum nú er innflytur fyri nærum eina milliard krónur árliga, og við semjuni um markið var tað ikki óhugsandi at ímynda sær, at hesin handil í framtíðini bleiv enn stórri.

Spurdur um bretar bert hava slakað í hesum máli, havandi í huga orðini hjá Uffa Ellemann Jensen, tá ið hann segði, at tað bar til at standa í Sumba og sptta inn í bretskt øki, um føroyingar góðtóku uppruauppskotið frá bretum, svaraði Lloyd:

– Nu hava vit ongar spitikappingar í Bretlandi, men eg má siga, at eisini vit eru væl nøgdir við sáttmálan. Eingin tapari er í hesum máli.

Bretski varauttanríkisráðharrin, Anthony Lloyd, segði týskvøldið, at føroyingar ikki skulu óttast, at bretar fara at reka føroysk fiskiskip út úr gráa økinum frá degi til dags

Mynd: Kalmar

Skjót viðgerð í Fólkatinginum

Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, segði tyskvøldið, at marknasáttmálin fer at fáa eina skjóta og góða viðgerð í Fólkatinginum. Longu 28. mai er ætlanin, at sáttmálin skal verða avgreiddur frá danskari síðu

LEIF LAADAL

Danska avritið av marknasáttmálanum bleiv longu í gjár sent við flogfari niður til Danmarkar, har tað bleiv lagt fyri Fólkatingið sama dag. Fyrsta viðgerð er 21. mai og onnur og seinasta viðgerð verður 28. mai.

Danski uttanríkisráðharrin vísti at siga, at breið semja er í Fólkatinginum um at góðtaka sáttmalan, so einki er til hindurs fyri, at sáttmálin verður góðkendur av øllum þartum, tá ið hann er liðugt viðgerður í bretska parlamentinum.

Enski varauttanríkisráðharrin, Antony Lloyd hevði eina heilsu við frá Tony Blair, forsætismalaraðharra, sum segði seg lova eina skjóta viðgerð av sáttmálanum í bretska parlamentinum. Lloyd segði, at eingin forðing var fyri, at sáttmálin verður góðkendur, so longu um ein mánað er alt tað formella í sambandi við góðkenningar fingið av vegnum.

Stjól ikki myndina

Danski uttanríkisráðharrin roynd als ikki at stjala myndina úti í Tinganesi tyskvøldið. Tað var, sum kendi hann seg eitt sindur illa, nú hansara undirskrift var neyðug a sáttmalan, fyri at hann skuldi vera galdandi.

Spurdur hvussu hann hevði tað við at sita í hesi staði, svaraði hann:

– Vit arbeiða við teimum reglum, sum eru galdandi. Vit kunnu ikki annað og eiga ikki at gera annað.

Niels Helveg legði afturat, at hann persónliga fegnaðist um, at avtalan var undirskrivað, tí hann vísti, at avtalan hevði stóran týðning fyri tann figgjarliga, sosiala og politiska framburðin í Føroyum.

Niels Helveg Petersen bleiv eisini spurdur, um hann nu helt Danmark ella Føroyar vóru vórðnar stórri. Hann svaraði:

– Fyrst og fremst verða tað Føroyar, sum fáa gagn av avtalunni, men tað er eisini til felags gagn fyri bæði londini.